Hósdagur 6. september

SVF

18.30 Gloymdar leikur 3:13
18.40 Jumanji 20
19.05 Hundurin bítur – hundaviðgerin er til arbeiðis - ensk dokumentarsending
20.00 Dagur og Vika við Grannum Okkara
20.35 Avdúkingin
21.05 Ally McBeal – am. rød
21.50 Ein øld verður fagnað 9:10 – am. dokumentarrød
22.35 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 1:2 – ensk krimirød
23.30 Liðugt

EUROSPORT.com

07:30 Ski Jumping: Fis Summer Grand Prix In Sapporo, Japan
09:00 Car Racing: Automagazine
09:30 Equestrianism: Samsung Nations Cup In Rotterdam, Netherlands
10:30 Mountain Bike: Uci World Cup In Mont-St-Anne, Canada
11:00 Football: Road To World Cup 2002
13:00 Tennis: Us Open In New York, Usa
15:45 Tennis: New York Stories
16:00 Tennis (Live): Us Open In New York, Usa
18:00 Football: Road To World Cup 2002
20:00 Boxing: From The Sports Pavilion At The Caesar Palace In Las Vegas, Usa.
22:00 News: Eurosportnews Report
22:15 Sailing: Sailing World
22:45 Ski Jumping: Fis Summer Grand Prix In Sapporo, Japan
00:15 News: Eurosportnews Report
00:30 Close

BBC PRIME

0.10 TLZ: »American Visions – The Promised Land«
1.00 TLZ: »Century of Flight – The Bomber as War Winner«
2.00 TLZ: »Jazz Raga and Synthesizers«
2.25 TLZ: »Maps – Under the Lens«
2.30 TLZ: »Powers of the President – Carter and Reagan«
3.20 TLZ: »Mind Bites«
3.25 TLZ: »Keywords«
3.30 TLZ: »Berlin - Unemployment and the Family«
3.55 TLZ: »Mind Bites«
4.00 TLZ: »Back to the Floor – Working Girl«
4.40 TLZ: »Landmarks – Tropical Rainforests – The Living Forest«
5.00 TLZ: »Japanese Language and People – Schooltime«
5.30 TLZ: »Teen English Zone«
6.00 Joshua Jones: »Haywire«
6.10 Playdays
6.30 The Really Wild Show: »Africa«
6.55 Celebrity Ready Steady Cook: »Carol Barnes & Alan Titchmarsh«
7.25 The Antiques Show
7.55 Change That: »Bedford«
8.20 Going for a Song
8.50 Style Challenge: »Mother's Day«
9.15 Zoo
9.45 Vets in Practice: »A Dogs Dinner«
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Frontios«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthrop Investigates: »The Bearded Lady«
13.25 Celebrity Ready Steady Cook: »Carol Barnes & Alastair Stewart«
13.55 Style Challenge: »Firewatch Women«
14.20 Joshua Jones: »Haywire«
14.30 Playdays
14.50 The Really Wild Show: »Africa«
15.15 Totp Eurochart
15.45 Great Antiques Hunt: »Salisbury«
16.15 Gardeners' World
16.45 Miss Marple: »The Body in the Library« - Part One
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Heartburn Hotel
20.00 Down to Earth: »In at the Deep End«
21.00 French & Saunders
21.30 Lost Gods of Easter Island
22.30 Muscle
23.00 The Cops

BBC WORLD

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 Holiday (r)
2:00 BBC News
2:30 Reporters (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 Talking Movies (r)
9:00 BBC News
9:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Holiday (r)
11:00 BBC News
11:30 Europe Direct (r)
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Top Gear (r)
15:00 BBC News
15:30 Europe Direct (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Life
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

3

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Blossom(G)
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:15 Pæn pige - sej sild
13:45 Interne affærer
14:40 Blossom
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Alle tiders barnepige
18:00 Felicity
19:00 TV Razzia
19:30 Kløcker og Vingsøe udfordrer Amerika
20:00 Tilbage til fremtiden
22:15 Før Robinson Ekspeditionen 2001 (G)
23:15 Vore værste år
23:45 Simpsons
00:15 Ti tommelfingre
00:45 Interne affærer (G)
01:45 Ricki Lake(G)
02:40 Vore værste år (G)
03:10 Simpsons(G)
03:35 Sunset Beach
04:20 Godnat

ÚF

07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur Hjalgrim Poulsen á Strondum lesur
07.15 Morguntónleikur
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan morgun Føroyar Kári Olsen og Dia Midjord leggja til rættis
08.00 Tíðindi
08.05 Góðan morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Rasmus Lyberth syngur (e)
09.50 Morgunlestur (e) Hjalgrim Poulsen á Strondum lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.03 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 15 tær bestu (e) Heðin Arge stílar fyri
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Handan hav (e) Tónleikasending hjá Fróða Løkságarð.
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum Victor Carlsen leggur til rættis
18.00 Barnaútvarpið Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
18.50 Tónleikur
19.00 Hvussu við mær Framhaldssøga eftir Colby Radowsky. Knút Olsen týddi. Katarina Nølsøe lesur. 2. partur
19.30 Løg mær dámar 4. og seinasta sending hjá Inga Samuelsen
20.00 Ljóðmúrurin Bjarni Mohr leggur til rættis.
21.00 Fimleikaløtan 2 (e)
21.05 Dagsetur Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Tíðindi

Rás

09:45 Orðið Bibliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Go'morin Skráin, veðrið, aktuelt, dagsins mál, prát við lurtarar og tónleikur.
11:00 Birgir Beinleiðis Birgir Sondum við gesti
12:00 Tíðindi
12:10 Lættur tónleikur
13:30 Ynskiløtan Heilsur frá lurtarunum Laila Jacobsen er vertur. Send heilsur via (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
15:00 Tíðindi
15:10 Ynskiløtan (framhald)
16:00 Lættur tónleikur
17:00 Norðlýsið Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi
18:10 Lættur tónleikur
19:00 Orð á leiðini Andaligur búnaðskapur: "Fylling Andans" Jógvan Zachariassen leggur til rættis. EvR Sending
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi
21:15 Orðið (e) Bibliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ M.C. Restorff (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 "The finishing touch" v/ Alex O'Campo
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtirið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan, Bønarevnu kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379

Vit gevast uml. middnátt

Hundurin bítur

– hundaviðgerin er til arbeiðis - ensk dokumentarsending

SVF Hóskvøldið kl. 20.15

Onglendingurin John Rogerson hevur eitt serliga gott tak á hundum. Hann hevur arbeitt við teimum í meira enn 30 ár og hjálpir hundaeigarum, tá teir ikki kunnu finna útav, hví hundarnar hava so løgnan atburð. Í sendingini skal John Rogerson m.a. hjálpa Saru og Ray, sum fullkomiliga lata seg stýra av hundinum Milo.

Avdúkingin

SVF Hóskvøldið kl. 20.15

Avdúkingin heldur nú sín fimm ára føðingardag og í hesi fyrstu sendingini í heyst hittir Jens Olaf Jersild danir, sum hava fingið hjálp aftan á avdúkingar í sendingini. Vit skulu m.a. hitta kvinnuna, sum aftan á eina sending, fekk meira enn 160.000 krónur frá einum tryggingarfelag. Nakrar vikur seinni sá hon aftur Avdúkingina, og fekk so 24.000 krónur afturat, sum hon hevði rætt til.

TV Razzia (6)

– Hugt verður nærri at ólógligum innflytarum

TV Razzia varpar ljós á menniskjasmuglarar og fólk, ið nýta flóttafólk sum svarta arbeiðsmegi. Vit hava sæð tey liggjandi deyð á strondini, og vit hava sæð tey goymd í bilum. Vit hava sæð tey ferðast um markið um náttina.

Leitandi eftir ríkidømi í vesturheiminum, flýggjandi frá fátækradømi og hungursneyð. Tey vilja gera alt fyri at sleppa til Danmarkar.

Bridge er eisini spælið hjá ungdóminum

Tað er ein av boðskapinum hjá danska bridge-rithøvundinum, - spælaranum og – samskiparanum, Svend Novrup, sum í hesum døgum heldur skeið í Føroyum, har bridge er í einum aldudali, meðan spælið annars vinnur seg fram um allan heimin

BRIDGE

Gesturin hjá Bridgesambandinum er ikki í iva um, at sera góðir møguleikar eru at menna bridgespælið her heima hjá okkum
Mynd: Álvur Haraldsen

- Tað er merkisvert, at bridge-spælið er í kreppu í Føroyum, meðan tað gerst alsamt meira vælumtókt kring restina av heiminum, har tað ikki longur eru valdsstýri, sum arbeiða ímóti spælinum. Tvørtur ímóti er bridge nú limur av olympisku familjuni, og verður hetta á skránni á vetrar-OL í Salt Lake City komandi ár. Bridge er vorðið partur av ítróttar- og mentamálastýrunum í fleiri londum, og granskarar á Berkeley University í Canada eru ovfarnir av kanningum, sum hava víst, at bridge eisini leingir um livialdurin á fólki. Hesi eru eisini frískari og eru sterkari mentalt, tí likamið framleiðir eyka nógv av serotonin, sum stimbrar minninum, meðan bridge verður spælt.

Danski Svend Novrup - rithøvundar við 78 bókaútgávum, herav nógvar um bridge – hevur altíð havt serligan als til bridge og talv í Føroyum, og fleiri ferðir hevur hann vitjað í samband við skeið og fyriskipan annars.

Er fyri øll

Hesa vikuna vitjar hann Bridgesambandið, og á ferðina fer hann so at siga runt kumpassina. Hóskvøldið helt hann skeið fyri fyriskiparum, fríggja- og leygardagin er skeið fyri øllum bridgespælarum, sunnudagin er opin kapping fyri pør, og endiliga verða tað føroyskir landsliðsleikarar, sum fáa gleði av honum mána- og týsdagin. Eitt, sum hevur hevur gjørt Svend sera bilsnan, er afturgongdin í talinum av ungum føroyskum bridgespælarum.

- Orsøkin tykist vera, at tey ungu ikki hava uppdagað, at bridge er perfekt til tey ungu. Tað er ein stór avbjóðing til bæði hugflog og skjóthugsni, og hetta á einum støði, sum er nógv meira veruleikakent enn telduspøl. Er hugurin kortini til telduna, so kanst tú eisini spæla bridge við fólk úr øllum heiminum á alnetinum. Kappingar byrja hvønn tíma hjá mongu útbjóðarunum, sum hava uppdagað heimsumfatandi kvalitetin í bridgespælinum.

- Øll ung – og eldri við - sum hava ein vin ella vinkonu, sum teimum dámar at íðka okkurt saman við, skulu vita, at bridge er idealt í so máta. Tú kanst ikki spæla hond- ella fótbólt saman við hinum kyninum, men í bridge eru tey á jøvnum føti. Eisini hóast nógv mannfólk at byrja við halda seg vera betri. Samveran í bridge hølunum er eisini sera fjøltáttað. Vinarbond verða knýtt fyri lívið, og tað er ein ítrótt, sum kann íðkast, til tann dagin, tá seinasti andin verður drigin. Tað er ikki nakað, sum er galdandi í nógvum øðrum ítróttagreinum. Ikki minst hjá teimum eldru, sum kanska gerast einkjufólk, hevur bridge víst seg at geva nýtt lívsvirði. Spælir tú bridge, hevur tú altíð vinir og samveru, og tú ert ongan tíð heilt einsamallur. Síðst men eisini fyrst skalt tú so eisini minnast til, at bridge er ótrúliga stuttligt at spæla. Mann skal tó ikki gerast somikið fanatiskur sum Mrs. Bennet úr Kansas City, sum í 1931 skeyt mannin hjá sær, tí hesin spældi eina upplagda kontrakt niður í einum spæli! Hon varð annars seinni fríkend, orsakað av sinnisjúku í løtuni, men seinni fann hon sær ein nýggjan makkara, so lítil nytta mundi kortini vera í, sigur Svend flennandi.

Hóskar til Føroyingar

HM hevur júst verið fyri fyri unglingar, og her fekk Danmark bronsu. Tað sama var galdandi í 1995 og 1999, meðan talan gjørdist um gull í 1997.

Hetta heldur Svend vera prógv um, at spælið hóskar til mentanina hjá norðurlendskum unglingum, um tey bert finna út av tí.

- Eg minnist framvegis ein mentamálaráðharra, sum segði við ein ungan mann. »Tú spælir ikki brigde. Spell! Tú veist ikki, hvussu keðilig eldraár tíni verða, og hvussu nógv tú hevur mist longu áðrenn tað«.

- Sjálvur havi eg annars altíð hildið, at bridge hóskaði væl til føroyingar. Teir hava veruligt flair fyri kortspæli, og teimum dámar tær avbjóðingar, sum eru í tí, at tú ikki kennir kortbýti, fyrr enn seinasta stikkið er tikið. Harafturat er krøvini nógv minni, enn til aðrar greinar. Tú skalt jú hava einar 15-16 persónar, fyri at seta eitt fótbóltslið saman, meðan bridge bert tørvar tveir persónar til eitt par, og fýra til eitt lið, sum kann luttaka í kappingum bæði heima og úti.

Rík minni

Spurdur, um hann hevur nakað mál, sum hann ætlar sær at røkka, nú hann er í Føroyum, sigur Svend, at tað hevur hann ikki í so máta.

- Eg vóni tó, at hetta kann gerast ein íblástur til at fáa fatur á fleiri nýggjum lium. Harafturat vóni eg, at eg kann prógva fyri meira royndu leikarunum, at bridge ikki verður torførari, men harafturímóti lættari, um mann adopterar nakrar av teimum nýmótans meldháttunum og mótspælsfrámerkini. At enda vóni eg sjálvandi eisini at styrkja um oddin í føroysum bridge, soleiðis at framyvir ikki bert er Danmark, sum av og á fær bank frá føroyska landsliðnum, sigur bridge-lærarin.

Og tað er eingin ivi um, at tað er ein royndur harri, sum nú aftur fer at læra frá sær her í Føroyum, og sjálvur er Svend ikki í iva um, at hann hevur fingið nógv frá bridge-spælinum, og at hann vónar, at kunna geva nakað av hesum víðari til føroyskar spælarar.

- Sjálvur havi eg spælt bridge, síðani eg var 18 ár, og bridge hevur tikið meg við sær kring knøttin. Ikki bert sum blaðmann, har eg í fleiri enn 30 ár havi skrivað um bridge og talv fyri politikken, men eisini sum spælari. Tað eru ikki nógv lond í heiminum, har eg ikki havi funnið vinir, sum altíð vilja bjóða mær vælkomnan.

- Seinastu 10 árini havi eg verið formaður í bridgefelagnum í Kerteminde, har eg búgvi, og har eru vit 70 limir í einum býi við 5.000 íbúgvum. Vit spæla fleiri ferðir um vikuna, hava kappingar uttan íhald, og eg kann eisini nevna, at í okkara summar Grand-Prix kapping vóru 150 luttakarar í ár. Hesir vóru úr øllum Danmark, umframt at nakrir útlendskir gestir eisini vitjaðu. Hetta hevur verið ein sera góð reklama fyri býin, og í felagnum hava vit við tíðini fingið kontaktir kring alt Europa umframt nakrar í Norðurafrika. Mín fatan er, at fleiri brotasjógvar av bæði átrúnarligum og politiskum slag kundu slættast, um fólk ístaðin lærdu hvønn annan at kenna gjøgnum spøl sum eitt nú bridge, tí har hevur tú ongar fordómar fyri hvørjum øðrum áðrenn tú byrjar.

- Tí er tað hjá mær eitt stórt ynski, at bridge fær eina endurreisn í Føroyum, og at tey ungu av álvara fara at geva spælinum ans. Hendir tað, vendst ikki aftur, tí eg kenni ongan, sum hevur fingið kunnleika til atdráttarmegina og sálina í bridge, og sum síðani hevur slept hesum áhuga, sigur Svend Novrup, áðrenn hann endar við at siga:

- Eg vóni ikki, at hetta er seinasta ferðin hjá mær í Føroyum. Eg vóni at eg innan leingi kann koma aftur og vera við til at halda fast um tað menning, sum helst skuldi verið fyri framman.

Hitti hetjuna

Jógvan Róin er avmyndaður í prikkutu fjallatroyggjuni saman við Laurent Jalabert

Tíðliga í hesum mánaðinum varð súkklukappingin, PostDanmark rundt, hildin í Danmark, og ein av býunum, sum súkklað var ígjøgnum, var Ålborg.

Millum teirra, sum høvdu leitað sær at hyggja at kappingini, var føroyingurin, Jógvan Róin (yngri), sum var á vitjan hjá pápa sínum.

Sum vera man, so ætlaði føroyski unglingin sær eisini at vita, um tað kanska kundi verið gjørligt at hitt onkran av yrkis súkklarunum, og stór var frøin, tá Jógvan fekk eyga á Laurent Jalabert, sum í mong ár hevur verið millum fremstu súkklararnar í heiminum. Millum annað setti hann eisini sín dám á Tour de France í summar, tá hann vann tvær etapur, umframt at hann gjørdist vinnari av prikkutu fjallatroyggjuni.

Sum Jalabert sat og bíðaði eftir at verða innskrivaður, fekk Jógvan orðið á hann, og umframt at fáa ein autograf, slapp føroyingurin eisini at verða avmyndaður saman við hetjuni.